# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Diplomati – sanktiónir og hernaðarlig loysn

Í farnu viku gekk freistin út, sum ST Trygdarráðið hevði sett Iran at gevast við royndum sínum at ríka uran til kjarnorkubumbur. Trygdarráðið, sum umboðar stórveldini í heiminum í dag, álegði Iran at gevast við royndum sínum á kjarnorkuøkinum fyri 31. august, tí annars fór tað at seta í verk sanktiónir móti landinum. Iran hevur svarað aftur, at tað fer ikki at lata onnur lond gera av, hvat landið skal og kann fyritaka sær á hesum øki. Landið stendur fast við, at tað arbeiðir bert við kjarnorku til friðarlig endamál.

Síðani freistin gekk út í farnu viku hava útmeldingarnar frá londunum, sum eru í Trygdarráðnum, verið eitt sindur ymiskar. USA er tað einasta landið, sum hevur eina heilt greiða støðu. Tað vil hava, at sanktiónirnar móti Iran verða settar í verk sum skjótast. Um ikki endiliga allar í senn, so kortini soleiðis, at byrjað verður við teimum meira "bleytu" sanktiónunum. Tann fyrsta skuldi so verið at forða iranskum kjarnorkuvísindamonnum at ferðast í øðrum londum. Tað tosar eisini um hernaðarlig tiltøk, um tað verður neyðugt.

EU londini eru meira varin. Tey halda ikki, at tíðin er komin til at seta sanktiónirnar í verk enn, tó at freistin er úti. Tey halda, at diplomatiið er ikki endaliga troytt og vilja tí geva tí enn eina tíð. Uttanríkisráðharrarnir í EU hava júst verið á fundi í Finlandi, sum stendur fyri formansskapinum í EU í løtuni. Teir samdust um at geva diplomatiinum enn ein tjans. Bæði Rusland og Kina hava nakað tí somu støðu sum EU.

Hetta er so ikki fyrstu ferð, at allur Vesturheimurin ikki dregur eina og somu línu í slíkum álvarsmálum. Tað stendur eisini greitt, at heykarnir aftanfyri Bush, tað verið seg Bolton í ST, Cheney í Hvítu Húsuum og Rumsfeld í Pentagon, hava eina aðra og nógv meira avgjørda og agressiva støðu til islamska heimin enn flestu av londunum í Europa. Hesir heykar halda, at vit í Europa eru alt ov veik og jánkaslig. Teirra støða botnar so eisini oftani meira í hernaðarligum heldur enn politiskum loysnum.

Sjálvandi eiga vit at forða fyri, at ein tjóð sum Iran fær atgongd til kjarnorkubumbuna. Hinvegin eiga vit at brúka diplomatiið so langt tað røkkur, tó vitandi at tað er eitt mark fyri tí eisini, alt eftir hvat mótparturin vil. Vit mugu hava álit á skilagóðu leiðslunum í Europa, tá tær siga, at diplomatiið er ikki endaliga troytt. Hinvegin má leiðslan í Iran eisini vita, at USA fer ikki í longdini at ganga við til, at einki hendir. Spurningurin er at vita, nær evsta pínumarkið er nátt fyri ávikavist sanktónum og hernðarligum tiltøkum. Tað skulu komandi dagar og vikur siga okkum meira um.

**Sosialurin**

# Fiskimálaráðið sparkar liggjandi mann

**EYÐSTEIN POULSEN**



Tann støðuga skerjingin av fiskidøgum hevur nú fingið okkum smáu at vakna við kaldan dreym. Tað er nú komið har til, at alsamt fleiri av teimum smáu hava valt at geva skarvin yvir, og velja ta løttu loysnina burtur úr hesari nærum vónleysu støðu.

Serfrøðingar og valdsbarónar, sum nærum hava heilavaskað hvønn annan við powerpoint, mergleysum hagtølum og útlendskt fokusseraðum teorium, mugu nú steðgast.

Lat meg leggja út við at siga, at eg havi eisini tann møguleika at stinga í sekkin og sleppa væl burtur úr fiskivinnuni, sum støðan er. Eg fari ikki at leggja fingrarnar ímillum. Vit vita, at vit hava ikki lív lagað, sum gongdin er í fiskivinnuni í dag. Grundað á stóra vandan fyri bæði lokalsamfelagnum her í Klaksvík og framtíðini hjá Føroyum sum heild, føli eg tað sum mína skyldu at seta spurnartekin við grundarlagið undir stýringini av fiskivinnuni í dag.

Mín vón er, at eg kann vekja ein tanka í fólki, sum starvast innan fyrisiting og sita við valdinum her í Føroyum. Soleiðis at tað verður sjónligari fyri hesum fólkum, at vit í stóran mun mangla tað praktiska íkastið í okkara nútíðarsamfelag.

Áðrenn fiskimálastýrið við uppbrotnum ørmum fór at útrudda okkum smáu, høvdu vit stórt álit á vinnuni og bjartar vónir. Lat meg bara siga tað beinanvegin, áðrenn fiskimálaráðharrin misskilir meg, eg skrivi fyri okkum smáu.

Tað, sum hendir við einum, sum velur at fara á skúlabonk, er, at viðkomandi fer burtur frá øllum veruleika og kemur at liva í einari teoretiskari verð, við nógvum teorium um, hvussu alt skal gerast ella ikki gerast. Tá henda skúlagongdin er lokin, kemur ein út í veruleikan aftur, hetta krevur eina serstaka umstilling. Tað er hetta síðsta, sum eg vil pástanda, gevur okkum øllum, sum hava valt at liva í veruleikanum stórar trupulleikar. Eg fari ikki at leggja øll lærd fólk undir at liva í einari teoretiskari pappírverð, men tað vísir seg, at vit hava fingið ein meiriluta í fiskivinnuumsitingini, sum letur seg lokkað av hesi pappírsverð.

Vit hava so mangan sitið og trekt upp á smílibandið eftir útsøgnum frá sokallaðum serfrøðingum innan fiski- og búskaparfrøði. Hesir hava nú fingið fatur á okkara veiku politikarum, og tí eru vit nú noyddir at taka dystin upp, um vit skulu hava lív laga.

Tað fyrsta, sum eg vil vísa mína ónøgd við er yvirlitstrolingarnar í 2006, sum serfrøðin byggir sítt tilmælið á. Fyrst í mars mánaði í fjør, lógu vit norðanfyri við línu. Vit høvdu fiskað í umleið fimm dagar; veðrið var av tí ringasta og hartil var streymurin harður. Magnus Heinason hevði eisini fiskað har í uml. sama dagatal. Tað nýtist ikki nøkur serfrøði at rokna fiskaríið út hesa tíðina: tað var vánaligt – tað var faktiskt kolasvart. Tá veðrið og streymurin byrja at batna, tosi eg við Magnus Heinason, og hava teir tá lagt leiðina móti landi. Teir skuldu skifta fólk, og vóru teir eisini útlúgvaðir av ringa veðrinum. Skiparin sigur, at tað hevði ongantíð sæð so ljótt út við yvirlitstrolingunum áður. Eg segði síðan við skiparan, at eg helt tað vera langt úti, at teir fóru heim nú, tá streymurin og veðrið fór at batna. Tað veit ein og hvør, at tá batnar fiskaríið eisini.

Men tað vísti seg, at tað hevði størri áhuga hjá teimum at halda klokkutíðina enn at fáa rættari hagtøl til vega. Tað syrgiliga við hesum er, at tá ið manningin á Magnusi var farin heim, fleirfaldaðist fiskaríið, og lat meg leggja afturat, at ein bátur kom og legði seg har, sum Magnus Heinason hevði togað, og fekk hann heldur meir av fiski, enn vit aðrir, sum vóru á leiðini.

Henda sama søgan hevur endurtikið seg ár um ár. Vit, sum hava hildið skil á útsøgnum hjá fiskifrøðingum og síðan givið hesum eftirmæli ár um ár, duga at síggja, at hesin vísindastovnur hevur langt eftir á mál. Tí vilja vit ikki verða offur fyri eini trend, sum løgmaður hevur slept sum eitt virus yvir tað arbeiðandi fjøldina, júst tað, at jarðarleysir og klokkustýrdir serfrøðingar skulu ráða okkum øllum.

Tað er kanska hørð orð, ið eg brúki, men vit kunnu bara staðfesta, at vit hava nógv at innheinta hesum viðvíkjandi. Vit fara ikki at kubba á stokkinum.

# GBOB verður aftur í ár

**TÓNLEIKUR**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Jón Tyril, ið er maðurin aftan fyri G!Music, ið skipar fyri The Global Battle Of The Bands, sigur, at Føroyar aftur í ár fara at luttaka í altjóða kappingini. Føroysku umførini verða sambært Jón í døgunum 12., 13. og 14. oktober.

Í fjør varð kappingin hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, men enn er einki alment um, hvar kappingin verður í ár. Ætlanin er aftur í ár, at finalan verður hildin í heimskendа spælistaðnum Astoria í London, ið hevur lagt pall til heimsnøvn sum Rolling Stones, Nirvana, Oasis, Blur, Madonnu, Kylie Minogue, Gloriu Gaynor, the Spice Girls og Christinu Aguilera.

Í altjóða finaluni í fjør fekk føroyski GBOB vinnarin Marius 6. pláss í eini marathon finalu, har ikki færri enn 34 bólkar spældu. Hetta var alt ov nógv at taka støðu til sama kvøld, so í ár verður finalan hildin yvir 3 dagar. Hon verður í døgunum 10., 11. og 12. desember.

Vinnarin av altjóða finaluni vinnur $100.000 og sleppur á eina konsertferð kring heimin.

Vinnarin í fjør írski Kopek, er í løtuni í ferð við at leggja síðstu hond á ljóðblandingina av fyrstu fløguni hjá bólkinum. Hann hevur júst skrivað umboðssáttmála við Tony Valentino, ið m. a. stóð aftan fyri at gera Kid Rock kendan.

Jón Tyril sigur, at G!Music í næstum fer at kunna um tilmelding og annað viðvíkjandi GBOB.

**Sosialurin** So-sialurin Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.